*Løgmaður ynskir oljufeløgunum vælkomnum men ávarar samtíðis:*

# -Tað skulu sterkir politikarar til at handfara oljupengarnar

*-Tað er ikki bara bara positivt. Vit mugu vera ómetaliga árvaknir. Tað skulu nevniliga sera sterkir politikarar til at handfara oljupengarnar sigur løgmaður og leggur aftrat: -Soleiðis sum man sær viðgerðirnar í dag, so loyvi eg mær tó at ivast. Men eg vóni vit verða nóg sterkir til ta tíð, tí tað er skjótt at kollrenna samfelagið eru vit ikki varin*

JAN MÜLLER

Ein av teimum, sum í dag er fegin um, at 1. útbjóðing á føroyskum øki nú er veruleiki, er Føroya løgmaður, Anfinnur Kallsberg. Hansara fyrsta stóra uppgáva sum løgmaður fyri skjótt tveimum árum síðani var at fáa gongd á aftur samráðingarnar millum føroyingar og bretar um markið. Ein marknasemja var fortreytin fyri oljuleiting á landgrunninum.

Nú markið er komið uppá pláss, og 1. útbjóðing somuleiðis er veruleiki vónar løgmaður, at vit fáa eina sunnan og góðan útvikling innan hetta annars so nýggja og ókenda økið, sum oljuvinnan er fyri okkum føroyingar.

Anfinn Kallsberg fegnast um, at løgtingið nú hevur umrøtt og avgreitt tær ymsu lógirnar, sum eru sjálvt grundarlagið undir komandi virkseminum. Hann bjóðar eisini útlendsku oljufeløgunum, sum eru sinnað til at gera íløgur her, vælkomin og vónar, at komandi útviklingurin verður at ganga bæði føroyska samfelagnum og teimum.

Men fyri Anfinn Kallsberg er ein komandi oljuleiting og harvið ein møgulig oljuvinna ikki bara nakað tú letur upp dyrnar fyri og síðani letur alt upp til tilvildina. Løgmaður er nevniliga samdur við tey, sum siga, at vit eiga at vera sera varin og fylgja útviklinginum neyvt - fyri harvið at minka mest møguliga um negativu árinini av eini fyri Føroyar so stórari vinnu.

-Tað er ikki bara bara positivt. Vit mugu vera ómetaliga árvaknir. Tað skulu nevniliga sera sterkir politikarar til at handfara oljupengarnar sigur løgmaður og leggur aftrat: -Soleiðis sum man sær viðgerðirnar í dag, so loyvi eg mær tó at ivast. Men eg vóni vit verða nóg sterkir til ta tíð, tí tað er skjótt at kollrenna í hesum.

Løgmaður ætlar at brúka tað hann er førur fyri at tryggja ein skilagóðan útvikling. -Tað hava vit jú eisini longu lagt upp til við hesi fíggjarlógini, har ekstraordinerir pengar inn í samfelagið verða slúsaðir út aftur við tað sama. Og tað kann vera ótrúliga torført, um vit finna nógva olju, men man má hava politiskan rygg til tað, og hava vit ikki tað, so kollsigla vit heilt skjótt.

**Oljupengarnir**

Løgmaður sigur, at eins týdningarmikið tað er at fara undir leiting eftir olju við hesi fyrstu útbjóðing, er tað at gera sær greitt, hvar møguligir framtíðar oljupengar skulu fara.

Hann nevnir í hesum sambandi Búkspargrunnin, har blokkurin longu er plaseraður. -Hetta er ein grunnur, sum vit eru samdir um, at allar ekstraordinerar inntøkur skulu í, harí eisini tær frá oljuni. Tað er stavnhaldið vit mugu hava. Og tað má man helst fáa kjølfest í lóggávuni so skjótt tað yvirhøvur ber til.

Løgmaður viðgongur, at tað verður kanska eitt sindur torført at skilja millum beinleiðis inntøkur til samfelagið og so tað avleidda virksemið av eini oljuvinnu og tí heldur hann eisini, at tað kemur at síggjast nakað aftur í samfelagnum. Men so er bara at vóna, at tað avleidda virksemið ikki verður so stórt, at tað einsamalt klárar at kollrenna búskapin.

Anfinn Kallsberg vísir á, at tað er greitt, at finna vit eitt hampuliga stórt felt, og tað fer at geva pengar og avkast, so verða tað so stórar peningaupphæddir í føroyskum samanhangi, har einki ella lítið liggur aftanfyri, at tað kann oyðileggja alt uppá onga tíð.

Hóast løgmaður sigur, at vit eiga at vera ómetaliga varin, so váttar hann tó, at tað, sum er minni vandamikið, eru veruligar íløgur. Men man skal eisini taka hædd fyri, at íløguvirksemi hevur eisini nakrar avleiddar avleiðingar.

-Kortini skal ein ikki vera so restriktivur, at man ikki fær gjørt nakrar íløgur, nakrar ábøtur í samfelagnum. Men tað, sum ræður um, er at forða fyri, at tú ikki fær eina drønandi inflatión og eitt uppskrúvað kunstugt lívsgrundarlag undir øllum føroyingum, at t.d. allir føroyingar ikki nýtast at arbeiða longur.

Hetta er tað, sum vit mugu ansa so væl eftir. Ein íløga er kanska ikki tað ringasta. Tað ringasta er lívsháttur ella ein vón, sum vit ikki uppá longri sikt hava basis fyri.

Løgmaður sigur víðari, at verður lægri skattur eitt av úrslitinum av hesum útviklingi, so má tað síggjast aftur í øktum kappingarføri.

-Hetta má alt verða uppá pláss, áðrenn tað kemur so langt. Vit hava longu sett hol á. Í vár fara vit at hava eitt aðalorðaskifti um búskap sum heild, og har koma framtíðar oljuinntøkur inn sum eitt náttúligt lið. Løgmaður roknar við, at hetta verður í februar. Tá verður eisini langtíðar íløguætlanin við.

Anfinnur Kallsberg er annars væl nøgdur við arbeiðið, sum okkara oljumyndugleikar hava gjørt. Tað er væl úr hondum greitt og kennir hann seg tryggan við tí.

-Nú mugu vit síggja, hvussu lógarkarmurin virkar fyri 1. umfar og verður tað mett neyðugt og rætt at taka optión ella onnur ting við í treytirnar, tá tað kemur til eitt annað umfar, so eiga vit at meta um tað til ta tíð.

Nú útbjóðingin er samtykt og almen latin upp vónar løgmaður, at tað verður breiður áhugi fyri at gera íløgur her, og heldur hann, at høgu prísirnir á olju kunnu kanska eisini hjálpa til.




*Anfinn Kallsberg, løgmaður fyri fyrstu ferð úti á einum oljuboripalli. Her á Snorrepallinum í Norðsjónum í fjør. Mynd Jan Müller*



*Soleiðis ímyndar Óli P sær á jólakorti framtíðar føroyska oljuævintýrið*



# Lata fyrstu loyvini í september

*Stórur áhugi tykist vera fyri at fáa hendur á útbjóðingartilfarinum til 1. útbjóðing. Landsstýrið móti móti at lata fyrstu loyvini í september í ár. Oljufeløg hava nú tríggjar mánaðir til at gera umsóknirnar*

JAN MÜLLER

Stórur áhugi er fyri fyrstu føroysku útbjóðingini skal pulsurin takast í sjálvum hjartanum hjá føroysku oljumyndugleikunum, skrivstovuni hjá Oljumálastýrinum. Har er gravgangur eftir faldaranum, sum er vorðin prentaður í sambandi við útbjóðingina.

Oljumálastýrið hevur fyrireikað seg væl til hesa einu so týðandi hending í føroysku oljusøguni, nevniliga fyrstu útbjóðingini til leiting á landgrunninum. Prentaður er ein faldari bæði á føroyskum og enskum og verður hesin nú sendur út í allar ættir - út til fleiri av teimum stóru altjóða oljufeløgunum. Eisini verða lýsingar settar í kend útlendsk oljubløð og ávísir so sum Uppstream og The Financial Times.

Í faldaranum bjóðar Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum oljufeløgunum vælkomnum til fyrsta útbjóðingartilfar.

Síðani er prentað lýsing eftir umsóknum um loyvi til oljuleiting. Oljumálastýrið sigur í tíðindaskrivi, at endamálið við útbjóðingarumfarinum er at tryggja, at føroyski landgrunnurin verður kannaður nágreiniliga, og vónin er at staðfesta kolvetni í slíkum nøgdum, at framleiðsla spyrst burturúr.

Tá loyvi verða veitt, verður dentur lagdur á arbeiðsskránna hjá umsøkjaranum, t.e. hvørjar kanningar, ið umsøkjarin ætlar at gera á loyvisøkinum. Somuleiðis verður dentur lagdur á, at føroyskar fyritøkur fáa veruligan møguleika at taka lut í virkseminum, soleiðis at leiting eftir olju kann fjøltátta føroysku vinnuna.

Í útbjóðingartilfarinum er eisini tikin hædd fyri at gera oljufeløgunum greitt, at føroyskir myndugleikar leggja dent á, at virksemi ikki verður miðsavnað men spjatt kring landið.

Útbjóðaða økið, ið liggur eystan fyri og í ein landssynning úr Føroyum, er umleið 14.000 ferkilometrar til støddar og fevnir um 56 heilar teigar og 26 partteigar.

Umsóknarfreistin er sett til 17. mai 2000 kl. 12. Landsstyrismaðurin í oljumálum miðar eftir at veita loyvi í september 2000.

Útbjóðingartilfarið og løgtingslógin um fyrsta útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum fáast við at venda sær til Oljumálastýrið. Tilfarið liggur eisini á heimasíðuni hjá Oljumálastýrinum á „http://www.oms.fo“ www.oms.fo











Fyrsta útbjóðingarumfarið í Føroyum

Lýsing eftir umsóknum um loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum á føroyska landgrunninum

Landsstýrismaðurin í oljumálum lýsir við hesum eftir umsóknum um loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum.

Økið, ið verður boðið út, liggur eystan fyri og í ein landssynning úr Føroyum, uttarlaga á landgrunninum og út í Hetlandsrennuna.

Freistin at lata inn umsóknir um loyvi er mikudagin 17. mai 2000 klokkan 12.00.

Aðrar upplýsingar og tilfar í sambandi við útbjóðingarumfarið, m.a. standardloyvi og eitt kort yvir útboðsøkið, fáast við at venda sær til:

**Oljumálastýrið**
Postsmoga 1162
FO-110 Tórshavn
Telefon: 31 19 44
Telefaks: 31 19 46
E-mail: oiladm@ofs.fo

Útbjóðingartilfarið er eisini tøkt á heimasíðuni hjá Oljumálastýrinum: www.oms.fo